# Jón Rói verður framvegis blá/gulur

**Danska Ekstra Blaðið skrivar, at partarnir eru samdir um leingja samstarvið**

ÚTISETI
*Jákup Mørk*

Hóst Jón Rói Jacobsen ikki hevur fingið ta nógvu spælitíðini hjá nú fyrrverandi donsku meistarunum í Brøndby, so bendir nógv á, at leiguavtalan millum Brøndby og HB verður longd. Upprunaliga gekk avtalan fram til summarsteðgin, men hóast trupulleikar við at koma á liðið, og hóast Brøndby nú styrkir enn meira um verjupartin, so bendir alt á, at samstarvið verður longt.

Sjálvur hevur Jón Rói sagt, at hann undir øllum umstøðum ætlar sær at halda fram við yrkisfótbóltinum í Danmark, og sambært danska Ekstra-Blaðnum, so verður hetta altso framvegis í Brøndby. Sunnudagin skrivar blaðið, at Brøndby og Jón Rói eru komin ásamt um at leingja sáttmálan, og at tað bert restar at fáa undirskriftirnar á pappír, áðrenn hetta verður staðfest.

Jón Rói er í løtuni heima í Føroyum, og ætlandi verður so nýggj avtala skrivað, tá hann kemur aftur til Brøndby.



*Jón Rói Jacobsen heldur fram í Brøndby, og so er bara at vóna, at hann í heyst kann flyta seg nærri besta liðnum*

# Tjaldur tekur liðið úr kappingini



*Fyri hálvum øðrum ári síðani tóktist Tjaldur loksins at hava lyft seg úr botninum í manshondbólti, men í vetur var støðan aftur tann vanliga, og nú tekur felagið liðið úr komandi hondbóltskappingini*

**Tað tykist longu greitt, at besta mansdeildin í hondbólti bert fer at fevna um seks lið í vetur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast runavíkingar nú hava roynt í nøkur ár, so hevur tað ikki eydnast teimuma at etablera Tjaldur sum eitt lið, sum av sjálvfylgju eitur at teljast millum tey betru í landinum.

Fyrstu árini var talan tó um sera tung tøk, men fyri einum ári síðani tóktist tað loksins, sum var felagið komið á rætta kós. Fleiri góð úrslit í endaspælinum togaðu liðið upp á fimta plássið, og seinasta vetur skuldi so enn eitt tak takast, men hetta bleiv ongan tíð veruliga til nakað. Í endaspælinum gjørdist talan soleiðis bert um eittans stig, og stór spurnartekin vórðu sett við, hvørt liðið yvir høvur átti at tikið lut í bestu deildini, tá leikararnir sjálvir tóktust leggja so-mikið lítið í venjingina, at formurin snøgt sagt ikki var nóg góður til at fylgja við liðunum í 60 minuttir.

Hetta var langt ífrá fyrsta ferðin, at hesin spurningurin varð settur. Undanfarin hevur hetta eisini fleiri ferðir verið uppi og vent, tá tað serliga fyrst í kappingarárinum hevur verið truplult at fáa liðið mannað, og enn verri at fáa menn at møta til venjingar. Var tað ikki fyri reglurna um útlendskar leikarar, har tríggir slíkir kunnu vera í hvørjum felag, hevði Tjaldur ivaleyst takkað fyri seg fyri fleiri árum síðani, men við Dejan Lacok, Dragisa Stojovic og Zoran Sarcevic hevur felagið tó havt leikarar, sum hava hildið liðnum burtur úr avgjørda aldudalinum.

## Útlendingarnir burtur

Hetta tykist tó vera søga nú. Dejan Lacok skal komandi árið verja málið hjá VÍF. Dragisa Stojovic skal eftir øllum at døma spæla við Neistanum komandi árið, og Zoran Sarcevic heldur sjálvur, at hann nú er farin upp um aldursmarkið hvat fyrstudeildarhondbólti viðvíkur.

Eftir aðalfundin í fjør, var nevndin hjá Tjaldrinum skift út, soleiðis at hvørki Rúni Joensen ella Ragnar Olsen longur eru at finna her. Júst teir báðir hava annars verið millum høvuðskreftirnar at hava besta mansliðið koyrandi, og uttan teir og uttan útlendskar leikarar hevur nýggja nevndin tikið avleiðingarnar av hesum. Í telduposti til Hondbóltssambandið hevur felagið boðað frá, at teir taka mansliðið úr landskappingini.

Og alt bendir á, at hetta fer at viðføra, at kappingin í vetur bert fer at fevna um seks lið. Úr aðru deild er einki felag, sum kann flyta upp, og sum støðan nú sær út, so eru tað bert seks hondbóltsfeløg, sum eru aktiv í fremstu mansrøðunum. Og av hesum eru tey fýra innan víðkaðu bøgarðarnar í Havn, meðan StÍF og VÍF so koma afturat í hesi kapping.

## Møgulig umskipan

Spurningurin er tí kanska, hvørt HSF bert ætlar at gjøgnumføra kappingina sum vant, ella um talan verður um broyttan kappingarleist. Her kundi eitt hugskot kanska verið at víðka kappingina, soleiðis liðini leiktu fimm ferðir móti hvørjum øðrum. Sjálvandi nakað sum viðførir, at býti av heima- og útidystum verður eitt sindur skeivt, men hetta er tó ein leistur, sum er royndur aðrastaðni, og sum als ikki nýtist at ver nakað bakkast fyri liðini.

Enn hevur Hodbóltssambandið tó ikki tikið støðu til hendan spurningin, og í øllum førum er tað helst nakað, sum krevur ein eykaaðalfund, tí ein umleggin av kappingini – hvussu hon so enn verður – kann bert fremjast við góðkenning av aðalfundinum.



EB/Streymur–NSÍ 1-1 (0-0):

# Yvirtíðin í parti við heimaliðnum

**NSÍ tóktist dúva upp á tepru leiðsluna, og tað vórðu teir sektaðir fyri í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Í mun til dystin móti HB seinasta vikuskiftið, so góvu teir úr samansetta liðnum ongan tíð skarvin yvir sunnudagin, og í yvirtíðini fingu teir eisini løn fyri stríðið, tá Ronnie Samuelsen kundi tryggja teimum annað stigið*

Tá ið Jens Petur Brattalíð, sum einki tóktist hava ímóti, at spælararnir fingu loyvi at brúka kropsligu styrkina, hevði bríkslað fyri síðstu ferð á Mølini sunnudagin, vístu spælararnir væl, hvussu teir kendu tað. NSÍ menninir vóru vónbrotnir um, at teir í síðstu løtu høvdu mist sigurin og harvið tvey stig, og teir á heimaliðnum fegnaðust um, at tað hevði eydnast teimum at vinna eitt stig í evstu løtu.

Útjavnandi málið fekk EB/Streymur í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Marek Vierzbicki legði úr vinstra horni fríspark innfyri. Sorin Anghel stútaði ímóti málinum, men Jens Martin Knudsen vísti sín góða klassa og hálvbjargaði. Bólturin fór eitt sindur út í høgra álopsborð hjá EB/Streymi, og tað eydnaðist Ronnie Samuelsen úr rættuliga spískum á ein ella annan hátt at bukta bóltin inn um strikuna, og harvið hevði heimaliðið fingið eitt stig.

At tað fór at vera heimaliðið heldur enn útiliðið, sum fór at fáa mál fram ímóti dystarenda, var ikki heilt óvæntað. Sum annað umfarið leið, tóktist tað sum um, at NSÍ hevði hug at toga eitt sindur í bremsuna. Teir vóru frammanfyri 1–0, og tað tóktist sum um, at teir hugsaðu meiri um at verja leiðsluna, heldur enn at arbeiða fyri at økja hana. Eisini við tí í huga at besta verja er álop.

## NSÍ tætt við

Fyrstu løtuna tóktist NSÍ ætla sær at avgera. Teir høvdu størri tyngd í álopspartinum, og teir vóru fleiri ferðir næstan framvið, og heimaliðið kendi seg trýst til at geva fleiri hornaspørk til mótstøðumenninar. Bóltarnir komu væl innfyri, og NSÍ menninir – eitt nú Óli Hansen, Helgi L. Petersen og Messias – royndu fleiri ferðir við stútarum, sum kortini ikki vóru heilt vandamiklir.

Helgi L. Petersen hevði onkra vandamikla skotroynd, sum fór dygst framvið málinum hjá Gunnari á Steig, men tað kom einki mál í 1. hálvleiki.

Eftir steðgin legði NSÍ seg beinanvegin á odda. Uppspælið til málið var, sum tað so ofta áður hevur verið, í høgru. Gert Langgaard og Brynjolvur Nielsen samanspældu, og Ian Højgaard legði í brotsteigin til Helga L. Petersen, sum staddur eitt sindur til høgru sendi í handaru síðuna av málinum.

NSÍ tóktist eftir málið at leggja seg eftir at økja um leiðsluna, og teir vóru onkra ferðina í góðum støðum. Men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin inn um Gunnar á Steig, og so dovnaði álopsspælið hjá NSÍ.

EB/Streymur hevði Marna Djurhuus mitt á miðvøllinum saman við Ronnie Samuelsen, og hesa ferð gjørdu teir eina nýggja roynd at tippa miðverjuholið, sum hevur verið, síðani Pacek gjørdist sjúkur (hann er heima í Póllandi nú, og teir rokna við, at hann verður við aftur eftir summarsteðgin). Hesa ferð fekk ungi Gert Hansen fyri fyrstu ferð møguleikan í miðverjuni, og hann stóð seg væl. Saman við Egili og hinum syrgdi hann fyri, at NSÍ ikki fekk fleiri enn eitt mál, og í evstu løtu megnaðu framrættaðu menninir at skjóta málið, sum bar eitt stig við sær til EB/Streym.

### Dysturin í tølum

**EB/Streymur–NSÍ 1–1 (0–0)**
0–1: Helgi L. Petersen 48.
1–1: Ronnie Samuelsen 90.
Dómari: Jens Petur Brattalíð

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Egil á Bø, Gert Hansen, Eyðfinn Joensen (Bárður Olsen) – Marek Vierzbicki, Marni Djurhuus (Jákup Martin Joensen), Ronnie Samuelsen, Magni á Lakjuni – Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen (Teitur Joensen)
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrur Jacobsen – Gert Langgaard (Jústines R. Hansen, 69.), Ian Højgaard, Kári Hansen, Andy Olsen (Áki L. Hansen) Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen (Rúni Rasmussen, 80.), Helgi L. Petersen

### Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 4 | 2 | 0 | 18 | 7 | 11 | 14 |
| 2 GÍ | 6 | 3 | 2 | 1 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 KÍ | 6 | 3 | 2 | 1 | 7 | 9 | -2 | 11 |
| 4 B36 | 6 | 3 | 1 | 2 | 13 | 6 | 7 | 10 |
| 5 NSÍ | 6 | 2 | 4 | 0 | 11 | 5 | 6 | 10 |
| 6 B68 | 6 | 2 | 3 | 1 | 5 | 4 | 1 | 9 |
| 7 FS V | 6 | 2 | 1 | 3 | 8 | 12 | -4 | 7 |
| 8 EB/Streymur | 6 | 1 | 3 | 2 | 7 | 11 | -4 | 6 |
| 9 VB | 6 | 0 | 2 | 4 | 6 | 15 | -9 | 2 |
| 10 Skála | 6 | 0 | 0 | 6 | 1 | 11 | -10 | 0 |

# HB kann hitta Celtic

**Vinnarin av Champions League undankappingardystinum millum FBK Kaunas og HB skal møta ongum mætari enn skotska Celtic**

EUROPA-CUP
*Jákup Mørk*

HB kann hitta Celtic. Tað var føroyska yvirskriftin, tá lutakastið um komandi europeisku steypakappingarnar hevði veirð fríggjadagin.

Í fyrsta undankappingarumfarinum hittir HB FCK Kaunas úr Litava, og vinnarin av hesum dystinum fær æruna av at spæla ímóti Celtic. Ein dystur, sum vissuliga man vera ein sannur fíggjarligur gloypibiti hjá føroyskum feløgum, umframt peningaupphæddina, sum annað av liðunum fær, bara tey spæla seg til næsta umfarið.

Spurningurin er so bara, hvussu tað fer at hilnast hjá HB. Í Litava er fótbólturin ikki fremsta ítróttargreinin í Litava, men tó so verða litavar styrkismettir nakað omanfyri føroyingar. Nakað sum eisini kom til sjóndar á landsliðnum, har Føroyar máttu lúta 2-0 í Kaunas fyri góðum hálvum ári síðani.

Hini bæði føroysku umboðini, KÍ og NSÍ, skulu bæði til Noregs. KÍ skal her royna seg móti skjótt fyrrverandi felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Molde, meðan NSÍ skal til Lynd.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at tað var um reppið, at KÍ endaði saman við Manchester City. Tað er nevnliga soleiðis, at undan lutakastinum verða liðini bólkað, og her vóru KÍ og Manchester City í sama potti, men lagnan vildi so ikki, at tað skuldu verða Fowler, Anelka, Seaman og Keegan, sum koma á vitjan hjá klaksvíkingum.

## GÍ tapi

Annars leikti GÍ sín fyrra dyst í inter-Toto kappingini leygardagin. Hesin dysturin var ímóti moldaviska Dacia, og endaði dysturin við 4-1 sigri til vertirnar. Tað stóð annars leingi 2-1 á máltalvuni, men seinastu løtuna sløkti heimaliðið alla vón hjá gøtumonnum við at skjóta tvey mál afturat. Málið hjá GÍ skeyt Krzystof Popczynski.

## Máltindurin, 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 5 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 4 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Birgir Jørgensen | VB | 4 |
| John Petersen | B36 | 3 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 3 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 3 |
| Jens Kristian Hansen | B36 | 2 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 2 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Elfinn Ørvarodd | FSV | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 2 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 2 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 2 |
| Rúni Nolsøe | HB | 2 |
| Atli Danielsen | KÍ | 2 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 2 |